# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vilja tit hava ein forseta, sum hevur áhuga fyri sjálvt teirri minstu avgerðini, so er tað Hillary*
*(Bill Clinton)*

# Trygdin á donskum flogvallum skal kannast

**Danska yvirgangstilbúgvingin er ikki herd, men fregnartænastan hjá løgregluni vil kortini hava trygdina á flogvallunum kannaða**



*Trygdin í og kring terminalbygningarnar skal kannast, sigur PET*

Tað er serliga trygdarviðurskiftini í og kring bygningarnar á teimum størru flogvallunum, sum PET vil hava myndugleikarnar at kanna, og fregnartænastan dylur ikki fyri, at áheitanin hevur samband við tilburðin á flogvøllinum í Glasgow seinasta leygardag.

- Løgreglan og viðkomandi flogmyndugleikar eiga at kanna umstøðurnar í og kring terminalbygningar, og harafturat eigur løgreglan at halda eyga við parkeraðum bilum, skrivar fregnartænastan hjá løgregluni í einum brævi til løgregluleiðslurnar kring landið.

Kunningarstjórin í Statens Luftfartsvæsen, Thorbjørn Ancker, sigur við danska útvarpið, at loftferðslumyndugleikarnir hava longu tikið neyðug stig til tess at forða fyrio atsóknum sum teirri í Glasgow. Hann leggur tó afturat, at loftferðslumyndugleikarnir fara at kanna, um onnur tiltøk skulu setast í verk á flogvallunum.

# Hann segði ov nógv

**Japanski verjumálaráðharrin var ov opinskáraður, tá hann segði, at tað var neyðugt at sleppa kjarnorkubumbunum niður yvir Japan í 1945**

Tað er ikki altíð, at ein skal siga tað, sum ein hugsar, og í so máta skulu politikarar vera serliga varnir. Tað noyðist japanski politikarin Fumio Kyuma at sanna. Í gjár var hann verjumálaráðharri, men tað er hann ikki longur.

Sunnudagin fekk Fumio Kyuma øði í nógvar japanar, tá hann segði, at tað var neyðugt hjá amerikanarunum at sleppa kjarnorkubumbunum niður yvir býirnar Hiroshima og Nagasaki í august í 1945 fyri at fáa enda á seinna heimsbardaga.

Tær báðar bumburnar kravdu meiri enn 200.000 mannalív og elvdu til ógvusligar líðingar mong ár eftir heimsbardagan, og tí gjørdust nógvir japanar í øðini, tá teir hoyrdu verjumálaráðharran. Í morgun tók hann avleiðingarnar og bað um at sleppa frá.

Orðini hjá fyrrverandi verjumálaráðharranum koma eisini stjórnini hjá Shinzo Abe, forsætisráðharra illa við, skrivar AP. Sagt verður, at stjórnin er illa umtókt, og at umdømið er ikki batnað síðani vikuskiftið.



*Fumio Kyuma er ikki japanskur verjumálaráðharri longur*

## STUTT SAGT

### Jørðin skalv

Klokkan hálvgum fimm fyrramorgunin vaknaðu fólk í grønlendsku bygdini Atammik við kaldan dreym, tá jørðin brádliga fór at skelva. Tað vísti seg at vera ein veikur jarðskjálvti, og hann vardi heldur ikki leingi. Nukaraq Poulsen í Atammik sigur við útvarpið í Nuuk, at hetta er aðru ferð, at tey hava havt jarðskjálvti har. Fyrru ferð var fyri góðum fimm árum síðani, sigur hann. Atammik er nærhendis Manitsoq.

### Partabrøv fella

Yvirgangurin í Bretlandi ávirkar partabrævavirðið á altjóða marknaðunum, tí íleggjararnir stúra fyri øðrum atsóknum. Tað hevði millum annað við sær, at virðið á evropeisku FTSE-skrásetingini fall 0,2 prosent í gjár, skrivar Reuters. Atsóknin at floghavnini í Glasgow var helst orsøkin til, at serliga partabrøvini í flogfeløgunum fullu í virði. Hjá British Airways var fallið 1,1 prosent, hjuá Air France-KLM 1,0 prosent og hjá Lufthansa 0,9 prosent.

### Ísland hall

Íslendingar útfluttu vørur fyri 120 mia. íslendskar krónur fimm teir fyrstu mánaðarnar í ár. Men innflutningurin var í sama tíðarbili 150 mia. krónur, so handilin við umheimin gav 30 mia. krónur í halli, sigur hagstovan í Reykjavík. Hetta er tó ein munandi bati samanborið við somu mánaðir í fjør, tí tá var hallið á handilsjavnanum næstan tvær ferðir so stórt sum í ár. 47 prosent av útflutninginum í ár er fiskur og fiskaúrdráttir.